# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Minningarorð um Dánjal Jákup Arnason Nielsen

**f.23.02.2000 d. 13.02.2007**

Eg havi lovað mær sjálvari, at eg skal skriva minningarorð um høgt elskaða sonin hjá systur míni, Dánjal Jákup Nielsen, ið andaðist, bert 6 ára gamal.

Eg var til arbeiðis, tá ið eg fekk tey tungu boðini um, at Dánjal Jákup var druknaður á Tvøroyri, saman við bestu vinkonu síni Báru - einans 7 ára gomul.

Dánjal Jákup var altíð í góðum lag og fúsur til hjálpar, har tørvur var á. Um summarið var hann altíð og hjálpti teimum í Fámjin at hoyggja, eins og at koyra traktor við Niels Jákupi.

Hvørja ferð, hann skuldi til Havnar, ringdi hann til mín og segði: Fína-mostur! Nú komi eg til Havnar í boblubað hjá tær, og so fari eg í SMS at eta í Burger King og BR at keypa dinosaurar.....

Tá ið eg seinast eg var í Suðri, áðrenn tú fórt til Várharra, prátaði tú so nógv um, hvussu nógv tú gleddi teg at fara í skúla í summar í Fámjin sum einasti 1. floks-næmingur.

Eisini prátaði tú nógv um, at tú og systkini Margit og Petra skuldu niður



til ZOO í Danmark.

Harmiligt at vita, at tú slapst ikki at uppliva hetta, ið tú hevði glett teg so nógv til.

Góðu tit, Evona, Arni, Margit og Petra; sárt er tað hjá tykkum, at ein so vøkur blóma er rykt upp við rót, og bert eitt tómi (tómleiki) er eftir. Harrin hjálpi okkum at varðveita tey kæru, mongu og góðu minnini vit eiga eftir. Má Harrin eisini hjálpa tykkum, Eileen, Fróða og Teiti, at koma víðari í hesi sváru neyð; men vit kunnu bert gleðast um, at ein dag skulu tit síggjast aftur í tað himalska stað.

Í Bíbliuni stendur skrivað, at vit hava lænt hesi børnini, og hesi kæru børn skulu vit ikki so hava so leingi. Fríðbjørg Jensen syngur hesi orð í einum vøkrum sangi hjá sær: "Sonur mín, fyri mær liggur ein fjald lívsleið tín."

Tað er kanska gott at onki at vita frammanu dan, so vit ikki stúra, og lívið má halda fram hjá øllum, hóast saknurin er stórur eisini hjá tykkum, ommuni og abbanum og langommuni í Froðba, ommuni í Fámjin, mostrum, fastrum, og vinum hjá okkara kæra Dánjal Jákupi.

Eg biði Várharra um at styrkja tykkum, at tit skulu fáa ta hjálp og tann styrk, ið tit hava brúlk fyri.

Hvíl í friði.

**Emmely mostur, Svend Erik gubbi, Sanna Katrin og Kamilla**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Martha Joensen** fer til gravar úr Miðvágs kirkju í dag kl. 14. Tey, ið vilja minnast Marthu kunnu lata Missónshúsinum eina gávu."

**Hans Andrias Olsen, úr Árnafirði,** andaðist mikudagin á Sambýlinum á Heygnum, 80 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi heim í Christianskirkjuna, leygardagin kl 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni sunnudagin kl.13.30. Tey, ið vilja minnast Hans Andrias, kunnu lata eina peningagávu til kirkjuna í Árnafirði, konta í Norðoya Sparikassa.

**Dagurin**
**28. september. Vencelaus**, deyður í 935. Sonur hertogan Vratislav í Bøhmerlandi. Av øvund læt heidni bróðirin Boleslav hann myrða. Gjørdist verndarhalgimenni hjá Bøhmen og er jarðaður í Sankta Vensils Kapelli í Vituskirkjuni í Prag, sum er bygd oman á toftunum av tí rotundu, hann sjálvur læt byggja

Fyri 40 árum síðan:

# Realskúlaflokkur í 1967

Her er ein av myndunum frá stóru realskúlaframsýningini, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Myndin er tikin uttan fyri Realskúlan av realskúlanæmingunum í 3. C í 1967.

Dreingirnir f.v.: Jóhann Mortensen, Jóan Hendrik Johannesen, Jóanes Lindarstein, Sólbjørn Mortensen, Kári Øster, Ingolf Johannesen, Ingi Helmsdal, Bjarki Johannesen, Jákup Persson og Helgi á Fløtti

Genturnar f.v.: Eydna Nielsen, Solveig Egholm, Lilja Jensen, Birgit Michelsen, Jórun Borgarlíð, Bjørg Simonsen, Turið Hansen, Maria Mørkøre, Vilbjørg Tórsheim, Elinborg Hansen, Rannvá Poulsen, Anna Maria Petersen, Bette Rasmussen, lærarinna, og Sussie Petersen

*Myndaeigari: Helgi á Fløtti*

